

# Allir norðmenn oljumillióningar

**Jan Müller**

28.02.2014 - 18:03

Oljan.fo

Norski oljugrunnurin vaks so mikið nógv seinasta ár, at í dag eigur hvør norðmaður eina millión kr. í grunninum.

Statens Pensionsfond, sum grunnurin eitur, er ein av heimsins størstu grunnum. Grunnurin varð upprunaliga stovnaður fyri at geva myndugleikunum ein fíggjarligan “buffara” alt eftir broytingum í oljuprísinum. Seinasta ár varð avkastið úr grunninum 15,9% ella 1200 milliardir kr., soleiðis at tað nú eru 5038 milliardir norskar kr. í grunninum.

»Úrslitið stavar frá íløgum í partabrøvum. Hóast 2013 var eitt ár við stórari óvissu í heimsbúskapinum, so var kortini framgongd á partabrævamarknaðunum,” sigur Yngve Slyngstad, sum stendur á odda fyri Norges Bank Investment Management, ið umsitur oljugrunnin.

Íløgurnar í partabrøv hava seinasta ár givið eitt avkast uppá 26,3%, meðan íløgur í fasta ogn hava givið 11,8%.

Umleið tveir triðingar av ognini í grunninum standa í partabrøvum, sum merkir, at grunnurin er heimsins størsti íleggari í partabrøvum.

Kelda Berlingske